## Málpolitikkurin bíðar

Tað er ikki bara í Føroyum, at tosað verður um ein málpolitikk. Í Grønlandi tosa tey eisini um ein málpolitikk, og har eru tey komin so mikið langt, at ein mállóg hevur verið til viðgerðar í Landstinginum. Eftir uppskoti frá landsstýrinum er tann endaliga viðgerðin júst útsett til næsta ár. Høvuðsendamálið við lógini er at styrkja tað grønlendska málið sum tað almenna málið í Grønlandi. Uppskotið er orðað sum ein rammulóg, men Landstingið heldur, at fleiri fyrireikingar skulu til, áðrenn lógin kann samtykkjast endaliga. Tí eru 2. og 3. viðgerð útsettar til várs.



## Fiskaðu meiri

Íslendsk skip fiskaðu í síðsta mánaði 77.400 tons, sum var góð 10.000 tons meiri enn í september í fjør. Botnfiskaveiðan var smá 36.000 tons. Av hesum vóru 14.000 tons toskur ímóti 10.000 tonsum í september í 2008, 6.000 tons vóru hýsa, 5.000 tons upsi og góð 5.000 tons kongafiskur. Av uppisjóvarfiski veiddu tey íslendsku skipini góð 38.000 tons í september. Av hesum vóru 32.000 tons sild og 4.000 tons makrelur. Sildaveiðan var nakað størri enn í september í fjør, men makrelveiðan var helvtina minni, skrivar Morgunblaðið.

# Æðudún gevur nógvar møguleikar



*Fáa æðurnar hús at byggja reiður í, er vandin minni fyri, at rovfulgur fer við ungunum*

**Við at gera æðunum hús at hava reiður í fæst hendur á nógvum æðudúni, tað hjálpir æðunum, og so eru eisini møguleikar at brúka hetta í ferðavinnuni, sigur Jens Kjeld Jensen, sum eru við í eini norðurlendskari æðuverkætlan**

NÁTTÚRA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kjeld Jensen*

Í fleiri øldir hevur æðudún verið brúkt til at fylla koddar og dýnur við. Eru møguleikar til at fáa eina vinnu burtur úr tí nú?

Ein norðurlendsk verkætlan við norðmanninum Thomas Holm Carlsen á odda hevur til endmáls at kanna henda spurning.

Noreg, Ísland, Grønland og Føroyar eru við í verkætlanini, og umboðið fyri Føroyar í samstarvinum er Jens Kjeld Jensen.

Hann er sannførdur um, at møguleikarnir eru nógvir, og at eitt miðvíst arbeiði harafrat ger æðunum eina stóra tænastu.

Stórir æðuflokkar eru at síggja í Føroyum, men eingin verulig teljing er gjørd. Mett verður, at 6000-7000 pør eiga í Føroyum.

Men tað er ikki sum at siga tað at fara runt at henta dún, nóg mikið til at fylla dýnur við. Neyðugt er at byggja æðunum hús í æðuvørpunum. Eitt æðuvarp er eitt stað, har nógv æða eigur.

Fáa æðurnar hús at hava síni reiður i, eru ungarnir betur vardir móti rovfugli.

- Tað hevði eisini borið til at víst slík æðuvørp fyri turistum, heldur Jens Kjeld Jensen.

### Serligar eginleikar

Tað hevur ongantíð verið nøkur vinna í Føroyum at savna æðudún. Fólk hava bara gjørt tað til sín sjálvs, tí tað er so tíðarkrevjandi. Dúnið má handfarast og reinsast í hond fyri at varðveita teir góðu eginleikarnar. Tað serliga við æðudúni er, at tað ikki klumpar seg saman sum annað fugladún.

Nøkur fá gramm av dúni fáast frá einari æðu, og tað skulu 1100-1200 gramm av dúni til eina dýnu.

Í størsta æðueggja- og æðudúnahaldinum í Noregi gera tey dýnur og annað við æðudúni. Ein dýna kostar um 48.000 norskar krónur.

Í Føroyum er einki æðuhald. Jens Kjeld Jensen gjørdi onkrar royndir at gera æðum reiður í Koltri, men tað arbeiðið steðgasti mestsum upp, tá ið Bjørn Patursson fór av oynni. Jens Kjeld Jensen væntar tó, at hann kann fara í gongd aftur í Koltri. Ikki ber so væl til í Nólsoy, tí nógv dún, sum er at finna, er so illa dálkað av skipunum í Nólsoyarfirði.

Fyri einum ári síðan greiddi Jens Kjeld Jensen í sjónvarpinum frá verkætlanini. Hann segði tá, at hann fegin vildi hava onkran aftrat sær til hetta idealistiska arbeiðið.

- Eingin ringdi, men hevur onkur hug at verða við, er bara at ringja til mín, sigur Jens Kjeld Jensen.

Verkætlanin hevur fingið stuðul frá NORA, og myndugleikarnir í Grønlandi hava latið stuðul til grønlendska partin.



*Æðudún hongur væl saman og klumpar ikki*